# Jómsvíkingar

Drekka teir í Jómsborg
bæði úti og inni,
drukku mjøð og kláran vín,
glaðir á hvørjum sinni.

*Tøkum lætt her í lundum,*
*leikum vár' menn,*
*latum váran dans væl falla.*

2. Drekka teir í Jómsborg
bæði við gleði og gaman;
har skal eingin stíga til borðs,
fyrr enn tríati ár var gamal.

3. Drekka teir í Jómsborg
uttan sorg og sút,
drukku fullar tólv mánar,
har kom eingin út.

4. Drukku fullar tólv mánar,
har kom eingin út,
tað var Vagnur Ákason,
hann gekk har fyrstur út.

5. Inn kemur Vagnur Ákason,
talar um sín vilja:
"Nú skal búgva skipini,
tí nú lystir meg at sigla."

6. So letur Vagnur Ákason
síni skipini búgva,
allar letur hann streingirnar
av reyðargulli snúgva.

7. Vindur hann upp síni silkisegl
gulli vovin í rá,
strikar ei á bunkan niður
fyrr enn á Noregis vág.

8. Kastar hann sínum akkerum
á so hvítan sand;
tað var Vagnur Ákason,
hann gekk har fyrstur á land.

9. Tað var Vagnur Ákason,
hann gekk har fyrstur á land;
har kom Ímundur hvíti,
hann høgdi av honum hand.

10. Inn kemur Ímundur hvíti,
ið mist hevði hand:
"Ófriður er í Noregi,
er gingin á kongsins land."

11. Inn kemur Ímundur hvíti,
ið fingið hevði mein:
"Komnir eru jómsvíkingar
so vítt yvir allan heim."

12. Svaraði kongur í Noregi:
"Nú man tað so vera,
nú skal eg lata boðini
til illgerðsfrúu gera.

13. Tólv merkur í reyðargulli,
tað vil eg henni senda,
drepur hon tann hin sterka her
og skilur meg við tann vanda.

14. Tólv merkur í reyðargulli
vil eg henni geva,
drepur hon tann hin sterka her
og skilur meg við tann trega."

15. Enntá var tað sendisvein,
hann heim í garðin fór,
úti Guðrun illgerðsfrú
fyri honum stóð.

16. "Ver vælkomin sendisvein
higar út til mín,
drekk nú hvat tær betur líkar,
mjøðin ella vín."

17. "Lítið er mær um mjøðin tín,
allvæl minni um vín,
tað er kongur í Noregi,
sendi meg til tín.

18. Tað er kongur í Noregi,
sendi meg á tín fund,
Noregi er av hendi gingin
eina so lítla stund.

19. Tólv merkur í reyðargulli
tað vil hann tær senda,
drepur tú tann hin sterka her
og skilur hann við tann vanda."

20. "Hann torir ei, kongur í Noregi,
senda mær boðini tey;
drepi eg tann hin sterka her,
hann kemur í størri neyð.

21. Hann torir ei, kongur í Noregi,
senda mær boð til handa;
drepi eg tann hin sterka her,
hann kemur í størri vanda."

22. Svaraði Guðrun illgerðsfrú,
á fáum kann hon hól:
"Fái eg hans unga son
at blóðga í mín stól.

23. Fái eg hans unga son,
nú man tað so vera,
tá skal Guðrun illgerðsfrú
miklar ódnir gera."

24. Enntá var tað sendisvein,
hann heim í garðin fór,
úti kongur í Noregi
fyri honum stóð.

25. "Ver vælkomin, sendisvein,
higar nú til mín,
hvussu tók Guðrun illgerðsfrú
við ørindunum tínum?"

26. "Tú gert ikki, kongur í Noregi,
senda sær boðini tey;
drepur hon tann hin sterka her,
tú kemur í størri neyð.

27. Tú gert ikki, kongur í Noregi,
senda sær boð til handa;
drepur hon tann hin sterka her,
tú kemur í størri vanda.

28. Svaraði Guðrun illgerðsfrú,
fáum kann hon hól;
fær hon tín hin unga son
at blóðga í sín stól.

29. Fær hon tín hin unga son,
nú man tað so vera,
tá vil Guðrun illgerðsfrú
miklar ódnir gera."

30. Svaraði kongur í Noregi,
sær ber gull á hond:
"Fyrr vil eg missa ein mín son
ell øll míni ríki og lond."

31. Sára græt kongur í Noregi,
honum rann tár á dúk,
tá ið teir bóru hans unga son
um hallardyrnar út.

32. Tað var Guðrun illgerðsfrú,
á fáum kundi hon hól,
sveinin reiv hon kykan sundur,
hon blóðgaði hann í sín stól.

33. Eitt kom æl av Kingilvág,
tað glumdi sum á húð,
allir krokaðu jómsvíkingar
inn í eina búð.

34. Eitt kom æl av Kingilvág,
ilt var móti at líta,
jómsvíkingar og reystir kappar
fast á kampi bíta.

35. Eitt kom æl av Kingilvág,
haglið stóð hvørt oyri;
voldi tað Guðrun illgerðsfrú,
at allur herurin doyði.

Úr Kvæði Vísur og Táttar hjá D. Magnussen og J. av Skarði. Her er niðurlagið, sum vanliga verður kvøðið.
Søgnin sigur, at Hákun jallur Sjúrðason (d. 995) offraði ein son sín fyri at fáa valdið í Noreg.

